# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Farið eftir bóltinum – og ikki Oyvindi!

- Koyr Oyvind frá! Hann spælir politikari! Hann skal ikki blanda seg í fíggingina...

Soleiðis valdu tveir tingmenn at svara, nú Landsverk hevur gjørt eitt upprit, sum sigur, at um Skálafjarðartunnilin og Sandoyartunnilin verða lagdir í eitt og sama felag, so kann Sandoyartunnilin gerast uttan eina krónu úr landskassanum.

Typiskt, kundu vit sagt. Men nógv fyri, at tingmenn soleiðis hótta ein stovnsleiðara, bara tí at stovnur hansara ger sína skyldu at upplýsa í hesum førum Vinnumálaráðið. Tíverri er støðið í politiska kjakinum ofta rættiliga óbúgvið populistiskt og destruktivt. Konstruktivur kritikkur er sum lundi á jólanátt.

Ein revakøka er bakað, politiskir rossahandlar helst gjørdir, og nú sita ávísir tingmenn og halda ondini, so tunnilsætlanirnar verða samtyktar. Úrslitið verður, at nakrir privatir íleggjarar kunnu skovla inn hundraðtals milliónir í vinningi upp á Eysturoyartunnilin, meðan tað almenna má rinda tilsvarandi upphædd fyri Sandoyartunnilin. Síðsta útspælið frá Landsverki kundi broytt hetta soleiðis, at vit fyri vinningin av Skálafjarðartunlinum fingu Sandoyartunnilin. Og hvat galið er í tí???

Tað liggur í kortunum, at tað almenna skal brúka einar 700 milliónir krónur til eina milliard upp á Sandoyartunnilin. Tað er eisini semja um – og hevur ligið í kortunum seinastu 20 árini – at undirsjóvartunlar skulu fíggjast við brúkaragjaldi. Nú hava vit tveir tunlar – og tveir eru á veg. Hví kunnu vit ikki koyra allar í eitt og sama almenna felag og hava eitt felags gjald fyri koyring? Um tað nú ber til, soleiðis sum Landsverk vísir á, at eitt øðrvísi fíggingarmodell kundi gjørt, at t. d. Sandoyartunnilin kundi gerast uttan almennar pengar.

Hetta hevði aftur frígivið nógvar almennar milliónir. Um vit bara hugsa um samferðslukervið, so kundi eisini ein nýggjur flogvøllur verið bygdur.

At tað stundar til løgtingsval sæst á øllum brøgdum. Men tingfólk eiga at sláa kalt vatn í blóðið – og viðgera málið úr skilabesta sjónarhorni og ikki bara fyri at baka egna kaku.

Vit eiga øll allar tunlarnar, sum skulu gagna øllum samfelagnum. Tí hevur eingin nakað ímóti, at íløgur verða gjørdar í undirstøðukervið í øllum landinum. Men tað skal gerast á skilabesta og mest gagnliga hátt – og sjálvandi eisini við fyriliti fyri ovurupphitaðum búskapi, so sum nýggi fíggjarmálaráðharrin so staðiliga hevur víst á.

Tí hava vit hesa áheitan á tingfólk: Farið eftir bóltinum heldur enn manninum!

**Sosialurin**

## Opið bræv til Hans Paula Strøm



**JÓGVAN VIÐ KELDU**
løgtingsmaður

Eftir at hava lisið grein í Dimmalætting 20. juli undir heitinum “Roskilde tikin fram um Klaksvík” og samrøðu við Tummas í Garði, læknastjóra á Landssjúkrahúsinum, fari eg at loyva mær at venda mær beinleiðis til tín við ovastu leiðslu og ábyrgd av føroyska sjúkrahúsverkinum.

Hópur av Føroya fólki spyr ídag , hvat tað er, ið gongur fyri seg innan okkara sjúkrahúsverk, har læknastjórin á Landssjúkrahúsinum sigur at: “Landssjúkrahúsið hevur hvørki heimild ella skyldu at senda sjúklingar til Klaksvíkar at fáa viðgerð”.

Í sjálvari greinini stendur ymist sera áhugavert, men millum linjurnar í svarinum frá Tummasi í Garði hómast nakað upplýsandi men sanniliga ikki sørt illgrunasamt.

Lat meg leggja dent á, at virksemið á Klaksvíkar Sjúkrahúsi er sáttmálaundirskrivað av øllum pørtum og landsstýrismanninum Hans Paula Strøm, og skuldi sostatt vigað tungt.

Í framtíðarálitinum hjá føroyska sjúkrahúsverkinum, sum landsstýrismaðurin legði til tingviðgerð í apríl mánað í ár, stendur m.a. á síðu 19 - 2.2 “Tað eru fyrst og fremst sjúklingarnir og teirra upplivingar og nøgdsemi av veitingunum og tænastuni, ið er rættiliga avgerandi, tá metast skal, um tað føroyska sjúkrahúsverkið er vælvirkandi”.

Samandrátturin sigur greitt á síðu 113 stk. 24: “Samskipanin av virkseminum millum Landssjúkrahúsið og Klaksvíkar Sjúkrahús kann økjast munandi”.

Samgonguskjalið - sum er politiski setningurin - dagfest 24. januar 2004 sigur m.a., at: ”... Samstundis heldur arbeiðið fram at samskipa og dygdarmenna sjúkrahúsverkið, soleiðis at bíðilistarnir verða burtur”.

Sum nevnt, er greiður sáttmáli gjørdur og undirskrivaður av øllum pørtum. Greið avtala fyriliggur um nýtslu av Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Umframt at her er ein møguleiki fyri at stytta um bíðilistar, eisini á Landssjúkra-húsinum, so finst her eisini møguleiki fyri at brúka Klaksvíkar Sjúkrahús meiri víðfevnt ella optimalt umframt, at hetta er ein ódýrari loysn, heldur enn at fólk enntá uttan at vilja tað, verða send uttanlands til viðgerðar.

Sjálvur havi eg varðhugan av, at Tummas í Garði, sum ikki er sjúkrahússtjóri fyri øllum tí føroyska Sjúkrahúsverkinum, men er læknastjóri á Landssjúkrahúsinum ikki er serliga vælviljaðugur fyri Klaksvíkar Sjúkrahúsi, og tí mótmælir hesi loysn á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Kanska er hetta eisini gjørt við tí í hyggju, at fáa størri játtan til Landssjúkrahúsið hóast tað er óneyðugt.

Núsitandi samgonga er samd um, at føroyska sjúkrahúsverkið skal brúkast optimalt, bíðilistarnir skulu skerjast, og at vit stuðla undir eina betri tænastu, og at privatar viðgerðir skulu takast í nýtslu um neyðugt.

Lat meg eisini vísa á, at tá Ríkissjúkrahúsið fær sjúklingar inn og bíðilistin er longri en hann eigur, verða privatu sjúkrahúsini eisini tikin í nýtslu og goldin fyri, eisini tá føroyingar verða sendir til Danmarkar!

Viðfeðin sum víst er til í Dimmalætting og sum sagt, ikki er eindømi, er uttanfyri alt mark, serliga tá viðgerðin er møgulig her heima.

Eg fari tí eisini at spyrja landsstýrismannin um prísmunin á at senda fólk til Danmarkar til viðgerðar og at senda hesi til Klaksvíkar og hvussu hetta verður goldið.

Sum heild fari eg at biðja landsstýrismannin um eina frágreiðing um hesi sera løgnu viðurskifti, har hópur av føroyingum stendur fullkomiliga spyrjandi, og ikki minst klientarnir, nú vit tosa um at føroyska sjúkrahúsverkið skal nýtast optimalt.

Lat meg leggja afturat, um Landssjúkrahúsið hvørki hevur heimild ella skyldu at vísa sjúklingar til Klaksvíkar Sjúkrahús, um hetta í fyrsta lagi ikki kann vísast til visitatiónsnevndina, sum hevur tilmælingarrætt at senda fólk aðrastaðni enn til Ríkissjúkrahúsið og í øðrum viðfangi, um landsstýrismaðurin bara ætlar at lata hetta fara aftur við borðinum.

Hóast hetta ikki sigur frá góðum, fari eg ikki útdýpa málið meiri í løtuni.

Í fyrstu syftu geri eg ikki meira við málið enn at bíða eftir svari, og verður svarið ikki nøktandi, komi eg við fyrispurningi á tingi eftir Ólavsøku.

## Oyvindur Brimnes eigur at fáa medalju

**OYVINDUR AV SKARÐI**

Stjórin á Landsverki ger tað einasta rætta, tá ið hann vísur á, at avlopið av Eysturoyartunnlinum kann gjalda fyri einum møguligum Sandoyartunnli.

Politikarar taka støðu til hvussu samfelagið verður útbygt. Fremsti ráðgevin í undirstøðukervinum í hesum landi er Landsverk. Sjálvandi eigur hesin stovnur, so sakliga hann kann, at upplýsa Føroyingum og myndugleikum um hvørjar útbyggingar eru bestar at gera í mun til politisku málsetningarnar fyri landið.

Í hesum førinum vísir hann á ein máta at rinda fyri Sandoyrartunnlinum. Hann hevur mett, at Eysturoyartunnilin fer at geva so mikið nógv av sær, at um vit øll eiga hann, so megnar hann at rinda fyri Sandoyrartunnlin.

Við hesum ger stjórin í Landsverk sítt starv til lítar, og hetta eigur hann rós uppiborið fyri.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.